**Kunngerð um friðing av økinum Frammi við Gjónna, við Mjáuvøtn og Leynavatn v.m.**

Sagt verður frá, at náttúrfriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu og yvirfriðingarnevndin sambært løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 II. parti, hava gjørt av at friða økið Frammi við Gjónna, við Mjáuvøtnini og Leynavatn v.m.

Markið gongur úr Leynarósanum og 5o m sunnanfyri Leynará longs vegnum upp móti Klivunum og víðari fram við hamrinum støðugt í mát umleið 5o m nú fram við vegnum til Djúpagil, har markið krossar vegin og fylgir Djúpagili, til markið fer í ein útnyrðing umleið 5o m frá Mjáuvøtnum. Síðani fer markið eftir hagamarkinum millum Hamrahaga, Frammi við Gjógv (matr. nr. 311) og Sjóvarhaga. Fremri Partur (matr. nr. 312) niðan í Hósvíksskarð. Harnæst norðureftir (frameftir) fjallarøðini millum Kollafjørð øðrumegin og Hósvík og Hvalvík hinumegin norður á "Bollan". Haðani vestur ella niðan á Húsadalsskarð í marknavarðan millum Kollafjørð, Hvalvík og Kvívík. Haðani eftir markinum millum Húsadalshaga í Hvalvík og Presthagan niðan á Sneis. Av Sneis fer markið suðureftir hagamarkinum millum Ognarhagan og Presthagan í Kvívík um Stígarnar í Argisá og fylgir Argisá oman gjøgnum Presthagan til umleið 28o m hædd. Haðani í ein landsynning í beinari kós í lítlan hamara, sam við hesum hamri oman á Drangarnar. Haðani gongur markið vesturyvir og fylgir hamrinum í mát umleið 5o m longs Leynará oman móti sjónum.

Tað friðaða økið er uppmerkt á "generalstabskorti."

Friðingin ber sambært § 9 í náttúrfriðingarlógini í sær, tá ikki annað við úrskurði er ásett, at umrødda øki skal varðveitast í sínum náttúrliga líki og við varðveitslu av plantum, djórum og jarðfrøðisligum fyribrigdum varðveitast óbroytt, soleiðis at serstakliga øll bygging, setan av steyrum, búðum ella øðrum hesum lík, íð kunnu misprýða, eins væl og tøka av grótí, mold, sandi, eyri, leiri, plantum og djórum er forboðin.

Form 267 G   Otto B. Wroblewski, Nytorv 19, 1450 København K

Friðingin ber tó ikki í sær avmarking av nýtsluni av økjunum sum higartil til landbúnaðarendamál, herundir uppdyrking. Friðingarmyndugleikarnir kunnu eisini gera frávik frá forboðnum um bygging, tá talan er um bygging til landbúnaðarendamál.

FØROYA YVIRFRIÐINGARNEVND, hin 18. juli 1983

J. Andreassen

fm.

---

UDSKRIFTENS/GENPARTENS/FOTOKOPIENS
RIGTIGHED BEKRÆFTES.
SORENSKRIVEREN (DOMMEREN) PÅ FÆRØERNE, den 22. august 1983

P. Rønning-Jølver
sekr.

Justitsministeriets genpartspapir